

*Lisbeth Salander er sera populer í USA, og nú skal Hollywood framleiða film um hana og journlistin Mikael Blomkvist*

# Salander tekur USA

SEINASTA BÓKIN Í **MILLENIUMRØÐINI** HJÁ **STEIG LARSSON** SELIR STÓRT Í **USA** Í LØTUNI, OG Í NÆSTUM SKAL **HOLLYWOOD** FRAMLEIÐA **FYRSTA** FILMIN UM **LISBETH SALANDER** OG MIKAEL BLOMKVIST



**SKALDSKAPUR**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Bókaraøðin Millenium hjá svenska rithøvundanum Steig Larsson hevur verið mest umtalaða bókaverkið í Norðurlondum seinastu árini, og nú er sølan av bókunum eisini rættiliga farin á flog.

Norðurlendingar í stórum tali hava keypt tær tríggjar bøkurnar í røðini, men nú eru amerikumenn eisini farnir at keypa Larsson-bøkurnar.

Triðja bókin í røðini, Luftslottet som sprängdes, kann gerast tann fyrsta bókin, sum selir meira sum elektronisk bók enn sum pappírsbók.

– Hetta er eitt nýtt fyribrigdi, at tað er so stórur áhugi fyri einari e-bók, at sølan av e-bókini er størri enn sølan av pappírsbókini, sigur Eva Gedin, sum er stjóri á forlagnum, ið hevur rættindini til bøkurnar hjá Steig Larsson.

Dagens Industri skrivar, at eitt skifti var ein Stieg Larsson bók seld í USA hvørt sekund – ella ein hálv millión bøkur um vikuna. Samanlagt hevur trírøðini selt umleið 10 milliónir eintøk í USA.

## Hollywood filmur

Allar tríggjar bøkurnar um journalistin Mikael Blomkvist og teldusníkin Lisbeth Salander eru gjørdar til film á svenskum máli, og hesir filmar hava verið sera væl umtóktir.

Nú skal Hollywood framleiða nýggja útgávu av fyrstu bókini í røðini, Män som hatar kvinnor, og tað fer neyvan at gera áhugan fyri skaldskapinum hjá Steig Larsson minni.

Bretski sjónleikarin Daniel Craig, sum eisini hevur verið í leiklutinum sum James Bond, skal spæla Mikael Blomkvist í Hollywood, og tann meira ókenda Rooney Mara skal spæla Lisbeth Salander.

Svenska útgávan av hesum filmi hevur fingið framúr góð ummæli í USA, og nógv fólk hava verið í biografum í USA og hugt eftir filminum.

## KLUMMAN



*Eyðun Klakstein*

# Vælkomin til Vikuskifti

Einki er sum lukturin av prentsvertu á einum nýprentaðum vikuskiftisblaði. At blaða, hyggja, snodda, lesa, undrast og undirhaldast.

Ella var tað nú eg, sum varð sigldur afturúr á opnum miðlahavi vónleyst saknaður millum bylgjubrotini frá nýggju miðlunum.

Avísin hevur seinnu árini fingið harðari og harðari kapping frá nýggjum, talgiltum miðlum, sum yvirtaka alt fleiri av uppgávunum, sum prentaða miðilin hevur havt í øldir. Men framvegis er blaðið har – og brúk er fyri tí. Ikki bert av nostalgiskum ávum.

Blaðleiðslurnar hava roynt at broytt síni bløð fyri at gera tey viðkomandi í einum nýggjum heimi við endaleysum skjótum internetmiðlum og sosialum netverkum, har fólk frætta tað mesta, meðan tað hendir - í fleiri førum helst eisini áðrenn tað hendir.

Tí má blaðið bjóða nakað annað enn tað, sum teir kviku og knøppu miðlarnir við endaleysum nyttugum og fullkomiliga óneyðugum upplýsingum kunnu bjóða. Fyrst og fremst snýr tað seg um at hava annað tilfar enn netmiðlarnar, og helst skal tilfarið eisini verða tilgjørt og borðreitt øðrvísi.

Eftir ein steðg í summar er Vikuskifti nú aftur í Sosialinum. Vikuskifti hevur verið sera væl umtókt millum okkara lesarar, og hetta er annar veturin, at vit fara í holt við Vikuskifti. Onkrar dagføringar eru gjørdar, men Vikuskifti fer framvegis at líkjast sær sjálvum við samrøðum, klummum, tipsum, bagrund, undirhaldi og góðum ráðum.

Hugsanin er, at Vikuskifti skal geva tykkum lesarum blaðsøgur av øllum hugsandi slagi. Fjølbroytt tilfar sum hóskar til eitt blað, sum kann liggja á borðinum eitt vikuskiftið.

Vit bjóða tykkum vælafturkomin til Vikuskifti í Sosialinum. Vit vóna at kunna upplýsa og undirhalda tykkum komandi mánaðirnar.




## INNIHALD


4 SAMRØÐA: **LÆR AT HVÍLA SINNIÐ**
7 TIPS: **HEYSTIÐ ER TERNUT**
8-9 BAKGRUND: **STJÓRNARSKIPANIN**
11 90 SEKUND: **LENE ESPERSEN**
12 BAKGRUND: **4000 FØROYINGAR PISSA Í BUKS**
14 TIL ARBEIÐIS: **JÓN SIMONSEN**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 FACEBOOK: **HVØR TÝPA ERT TÚ?**
18 ÚTISETIN: **OSVA OLSEN**
19 MIÐLAMJAR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN: **SÚKKLA Í LONDON**


VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Lene Espersen / Mynd: Leo Poulsen